# Bóndasonur biðin at reka keypssamtøku



*Spurdur, um hann at Ficher, svaraði danin; »Nej, en ganske almindelig »Fisker«. Fisker kom í 1938 til Klaksvíkar at gera eina roynd at seta á stovn eina keypssamtøku har. Myndin, sum er tikin niðanfyri fiskastykkið á Stongunum, er av 21 ára gamla Jógvani Gerðalíð í Klaksvík, sum Fisker ætlaði at yvirtala at gerast handilsmann*
*(Mynd: Fisker)*

**Í 1938 varð ein roynd gjørd at seta eina keypssamtøku á stovn í Klaksvík. Tað var ein dani, Fisker, sum gjørdi hesa roynd. Hetta veit Jógvan Gerðalíð í Klaksvík at siga okkum**

HANDIL OG SØGA
*Rúna Sivertsen*

– Nú nakað hevur verið at sæð um keypssamtøkuna í bløðunum í samband við, at liðin eru fimti ár, síðani fyritøkan byrjaði sítt virki í Føroyum, rann mær í hug, at eg fyri 64 árum síðani varð spurdur, um eg vildi leiða ein slíkan handil í Klaksvík.

Hetta sigur Jógvan Gerðalíð, haldbóndi í Gerðum.

Hann veit ikki, um royndir vórðu gjørdar aðrastaðni í Føroyum tá, men hann heldur, at tað kann hava verið kríggið, ið byrjaði í september 1939, sum steðgaði hesum ætlanum.

Í 1938 var 150 ára hátíðarhald í Danmark fyri avtøkuni av stavnsbandinum. Í samband við hátíðarhaldið bjóðaði Landbrugsrådet í Føroyum teimum, sum høvdu hug at fara til Keypmannahavnar, frían ferðaseðil við Tjaldrinum.

### Kríatúr og »Brugsen«

– Tiltakið, vit vórðu boðin til, var á Bellahøj, nær Keypmannahavn og vóru vit um 20-25 føroyingar sum fóru avstað, sigur Jógvan.

Hann sigur, at hetta var ein væleydnaður túrur, har nærum alt, sum hevði við jarðarbrúk at gera, varð sýnt fram.

Á framsýningini vóru alskins kríatúr, tær mest framkomnu landbrúksmaskinur og forngrípagoymslur við teimum elstu amboðunum innan jarðarbrúk.

– Umframt hesa framsýning, vórðu vit eisini boðin runt í býnum at síggja ymiskar fyritøkur og millum nógvar aðrar, eisini Brugsforeningen, greiðir Jógvan frá.

Hann minnist, at eftir at tey høvdu sitið til borðs har, kom ein maður til hansara at fregnast um krambaviðurskifti í Føroyum.

Hesin maður kundi hugsað sær ein túr til Føroyar og spurdi Jógvan, um hann vildi taka í móti honum. Jógvan beyð honum at vera hjartaliga vælkomnum.

### Bóndin biðin at handla

Hesin góði maður, Fisker at navni, kom so til Føroya; tað mundi vera um mánaðarskiftið, juni/juli 1938.

– Tá Fisker var komin til Føroya, spurdi hann meg, um eg hevði áhuga í at seta eina keypssamtøku á stovn í Klaksvík, men tað helt eg meg ikki hava førleika til – og ei heldur hevði eg hug at reka handil, sigur Jógvan.

Men Fisker gavst ikki so, hann spurdi Jógvan, um hann ikki kundi vísa honum á onkran, ið kundi hugsað sær at tikið sær av hesum.

– Eg fór fyrst til Niels Vang, sum var leiðari í handlinum á Biskupstøð. Vinarligur, sum Niels altíð var, vísti hann mær ikki frá sær, men segði, at hetta kundi hann ikki taka sær av. Hann var jú leiðari av størsta handli her norðuri, sigur Jógvan.

Niels Vang var so beinasamur, at hann skrivaði eitt vakurt viðmælisbræv um Kjartan Lützen, sum var bókhaldari hjá Kjølbro, og bað meg vita, hvat hann helt um hetta.

– Eg havi einki skrivað niður frá hesi tíðini, men minnist eg rætt, fóru Fisker og eg norður á skrivstovuna hjá Kjølbro, har hann skuldi hitta Kjartan. Har søgdu vit hvørjum øðrum farvæl, og eg frætti einki meiri um hetta, sigur Jógvan Gerðalíð at enda.



*Jógvan Gerðalíð uttan fyri seyðahúsið uppi á Gørðum. Jógvan er enn virkin og er nú í ferð við at gera klárt til slaktið. Træbonkin, sum seyðaskinnini hanga á, munnu mong bera kenslu á - og hvør skuldi trúð, at hesin gamli bonkur úr Betesda, einaferð fór at tvinnast saman við søguna um keypssamtøkuna*
*(Mynd Rúna Sivertsen)*



# Beinleiðis samband úr tunlinum



*Farið er undir at gera portalarnar báðu megin undirsjóvartunnilin lidnar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Neyðtelefonirnar í undirsjóvattunlinum ringja beinleiðis til alarmcentralin, og til ber at síggja, hvar tann, sum tekur telefonina, er staddur, eins og eisini sæst, beinanveg ein eldsløkkjari verður lyftur upp inni í tunlinum, hvar í tunlinum hetta er**

TUNNILSTRYGD
*Edvard Joensen*

Trygdin í Vágatunlinum verður nógv betri, enn hon er í nøkrum øðrum føroyskum tunli. Rímiliga stutt verður millum neyðtelefonirnar, og styttri millum eldsløkkjararnar.

Fyri hvørjar 250 metrar, koyrt verður í Vágatunlinum, er ein eldsløkkjari festur á tunnilsveggin. Hvørja ferð ein teirra verður lyftur upp av heftinum, fer fráboðan til alarmcentralin, har boðað verður frá, júst hvar í tunlinum, tann, sum tekur eldsløkkjarin, er staddur. Soleiðis ber altíð til at staðfesta nágreiniliga, hvar hjálp er fyri neyðini, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunlinum. Fráboðanin verður eisini skrásett við dagføring og klokkutíð.

Við annahvønn eldsløkkjara, tað vil siga fyri hvørjar 500 metrar, verður eisini ein neyðtelefon sett upp. Hon virtkar á leið á sama hátt sum eldsløkkjarin við tað, at tað ringir á 112 í somu løtu, hornið verður tikið av, eins og skrásett verður við dato og klokkutíð, og víst verður á, hvar í tunlinum hendan telefonin er. Tann, sum tekur telefonina, hevur ikki fyri neyðini at trýsta á nakran knøtt fyri at fáa samband, sigur stjórin í Vágatunlinum.

Tað er ikki videoeftirlit inni í tunlinum, sigur Dávur Reinert Hansen, men við báðar tunlarnar aftur ímóti.

Soleiðis ber altíð til at vita, hvør og hvussu nógvir bilar eru inni í tunlinum, eins og altíð ber til at finna teir aftur seinni, um brúk av einihvørji orsøk skuldi verið fyri tí.

Umframt verður so eisini vanligt telefonsamband inni í tunlinum, so til ber eisini at brúka fartelefonina.

Dávur Reinert Hansen sigur, at arbeitt verður við fullari ferð, og enn verður miðað eftir, at tunnilin letur upp tann 26. november.

Teir eru komnir væl áleiðis við tekingini inni í tunlinum, eins og elektrikararnir eru farnir at heingja ljósarmaturini upp, og ljóstalvur fara helst at verða settar upp í komandi viku, væntar stjórin.

Men tann stóra spurningin, sum øll seta í dag, um hvat tað fer at kosta at koyra gjøgnum tunnilin, vil hann ikki svara uppá.

Dávur Reinert Hansen sigur, at tað verður ikki kunngjørt, fyrr enn stutt áðrenn latið verður upp.

– Onkur fer kanska at halda tað vera nógvar pengar, men í mun til ta tænastu, sum latin verður, verður tað bíligt at koyra gjøgnum tunnilin, letur hann tó leka út, hóast hann kortini sigur, at endaligi prísurin enn ikki er fastlagdur.

Útsjóndin við báðar tunnilsmunnarnar broytist nú dagliga. Farið er at seta betongelement upp við báðar munnarnar, Teir sonevndu portalarnar. Tað er um at vera liðugt Vágamegin, meðan eitt sindur er eftir at gera Leynamegin.

Har gjaldstøðin skal standa á Vágalandinum, verður neyðugt við onkrari heilt lítlari spreinging afturat, sigur Dávur Reinert Hansen. Onkur kneysi skal spreingjast burtur, og vegurin, sum gjørdur er til rættina hjá sanda-vágsmonnum sunnavert tunnilsmunnan, skal flytast nakað niðan. Men tað er einki arbeiði, sum hindrar nakað sum helst, sigur Dávur Reinert Hansen.

## Fluttur til Danmarkar

**Maðurin, sum í seinastu viku fekk skaða undir arbeiði uttan fyri Vágatunnilin, varð fluttur til Danmarkar til læknaviðgerð**

### Arbeiðsvanlukka

Ungi maðurin, sum arbeiddi við grótlaðing fyri byggifelagið J&K Petersen, varð mánadagin lagdur undir skurð á sjúkrahúsi í Danmark.

Frá byggifelagnum varður sagt, at tað einasta tey vita, er, at skurðviðgerðin gekk væl, og at maðurin hevur tað gott eftir umstøðunum.

Sum skilst eru vónir fyri, at skaðin ikki er so álvarsligur, sum fryktandi var fyri av fyrstan tíð, siga tey.

**ej**

# Framtíð í Kollafirði

**Føroya Tele byggir eitt lítið hús í Kollafirði, sum skal hýsa eini av framtíðar telefonstøðunum hjá felagnum**

SAMSKIFTI
*Edvard Joensen*

**Kollafirði:** Talan er um eina støð til sonevndan fordeilara, sum brúkast skal í samband við eitt nú ADSL linjurnar hjá Føroya Tele, sum nú verður bygt í Kollafirði, sigur økisleiðarin hjá Føroya Tele í Norðurstreymoy.

Tað stóð ein lastbilur og bíðaði, meðan ein gravimaskina fylti upp í lastina, hendan dagin, vit komu koyrandi framvið í Kollafirði.

– Okkurt, sum Føroya Tele skal byggja, segði lastbilførarin okkum, at teir vóru í holt við.

Jan Andreasen, økisleiðari hjá Føroya Tele í Norðurstreymoy og Norðureysturoy, greiðir frá, at talan er um eitt lítið hús, sum í veruleikanum skal flyta framtíðina nærri brúkaranum.

– Nýggja tøknin er soleiðis, at kaðalarnir kunnu ikki vera longri enn fýra kilometrar, so tí er neyðugt við fleiri sovorðnum smáum støðum ymsastaðni, greiðir hann frá.

Øll útgerðin gerst bara minni og minni í vavi, so vit eru við at ganga burtur frá størru bygningunum, sum til dømis tí, sum standur frammi í Kollafjarðardali. Har er at kalla einki inni longur í mun til tað, sum var fyri bara fimmseks árum síðan. Tá farið varð undir digitaliseringina, minkaði alt so, at tað mestsum sæst ikki aftur, sigur hann.

Hetta húsið, sum bygt verður í Kolafirði, er bert eitt av fleiri slíkum, sum fara at verða at síggja ymsastaðni í landinum, sigur økisleiðarin hjá Føroya Tele okkum.



*Teir grava út fyri eini sonevndari kiosk hjá Føroya Tele, sum skal flyta framtíðar teletøknina nærri brúkaranum*
*Mynd: Edvard Joensen*